




# Eitt endaleyst hav av møguleikum



Val X

HEIDI PETERSEN
Tjóðveldi

Framhaldandi vælferð í Føroyum, í morgin og um tjúgu ár, er tengd at hvørji val vit tora at gera í dag. Tora vit at satsa uppá útbúgving og gransking? Tora vit at gera eina íløgu í framtíðina, við at skipa eitt høgt útbúgvingarstøði í Føroyum? Tora vit at skapa støðugar og greiðar karmar um vinnulívið, so tað fær møguleika at kappast og mennast á jøvnum føti við vinnulív í øllum heiminum? Tora vit at satsa figgjarorku í ein grunn til íverksetan og marknaðarføring av eitt nú føroyskum tónleiki, sjónleiki, dansi, myndlist o.ø.? Tora vit at satsa uppá KT, bæði við útbúgving og gransking á hægsta støði? Tora vit at taka ábyrgd á umhvørvisøkinum?

Hetta eru í mínari verð nakrir av teimum mest átrokandi spurningunum, vit sum politikarar skulu taka støðu til, eftir komandi val.

JA, eg tori at satsa uppá alt hetta. Síggi Føroyar og føroyingar sum eitt endaleyst hav av møguleikum. Møguleikum fyri menning og vælferð, møguleikum at vera slóðarar, eisini á altjóða pallinum. Møguleikum at taka altjóða ábyrgd á umhvørvisøkinum. Møguleikum at vísa verðini veg, tá tað ræður um virðing fyri einstaka menniskjanum í tí sterka felagsskapinum.

Her skal eg koma inn á trý ítøkilig mál eg vil arbeiða við á Føroya Løgtingi - í eini røð av øðrum týdningarmiklum málum.

AT skipa Fróðskaparsetrið sum eitt altjóða UNIVERSITET við útbúgving og gransking innan m.a. matvørumenning og framleiðslu, gengransking og biotøkni, KT og løgfrøði.

AT seta á stovn ein altjóða HAVGRANSKINGARDEPIL, sum kann slóða fyri Føroysku ábyrgdini av umhvørvinum í altjóða samfelagnum.

AT skipa ein ÍVERKSETARAGRUNN sum skal stuðla íverksetarum og marknaðarføring úti í heimi av føroyskari framleiðslu. Føroysk framleiðsla her fatað í breiðari merking: sum mentan og list, KT og tøkni og allar hugsandi vørur og tænastur sum kunnu vera við til at skapa eitt meiri fjølbroytt vinnulív, enn vit kenna í dag.

Fyri meg hevur hetta tað felags endamálið, at tað stuðlar uppundir at vit kunnu skipa einar FRÆLSAR FØROYAR.

**X við E**
**Les meira á www.tjodveldi.fo/heidi**

# Borgarligur tjóðskaparflokkur



Val X

JÓGVAN Á LAKJUN
landsstýrismaður og valevni
Fólkafloksins

Ivast tú í, hvønn, tú skalt velja, so fari eg at heita á teg um at velja onkran á A-liðnum.

Og tað er so upplagt. Fólkaflokkurin er einasti borgarligi tjóðskaparflokkur – ja, eg vil siga, einasti borgarligi flokkur yvirhøvur í Føroyum.

Vit vilja, at vinnan skal hava tað gott, at skattatrýstið skal ikki økjast, at ognarskattur ikki skal koma upp á tal, vit vilja varðveita sjómannafrádráttin, vit vilja fjálga um familjuna og hjúnalagið, vit vilja stramma upp í fólkaskúlanum o.s.fr.

Fólkaflokkurin er ein tjóðskaparflokkur, og tað hava vit sanniliga prógvað.

Vit samtyktu yvirtøkulógina, sum staðfestir okkara sjálvsagda rætt at taka fulla ábyrgd av øllum málsøkjum, og vit settu okkum fyri at yvirtaka nøkur mál. Tað gjørdu vit eisini. Sjálvur hevði eg ta gleði sum landsstýrismaður at standa fyri yvirtøkuni av Fólkakirkjuni – hetta mál, sum hevur verið kjakevni í áratíggjur! Hjá okkum er tað ikki bara snakk.

Og vit ætla at halda fram á somu leið, til øll málsøki eru yvirtikin!

Fólkaflokkurin vil, at tann einstaki borgarin skal hava frælsi til sjálvur at leggja egin viðurskifti til rættis. Men samstundis er so týðandi, at vit ikki gloyma tey, sum ikki eru ment at klára seg sjálv í samfelagnum. Her hava vit sum politikarar eina av okkara størstu skyldum: at taka okkum av okkara veikastu borgarum.

# Føroyska Skúlaverkið og KT



Val X

RÓGVI NYBO
Tjóðveldi

**Vitan er styrki. Vitan er lykilin til menning av samfelagnum og til framburð. Og Føroyar eru á veg móti at gerast eitt vitanarsamfelag, siga vit sjálvi**

Vitanarsamfelagið byggir sjálvsagt á vitan. Men vit eiga at hyggja nærri at, hvat tað er fyri vitan, ið vit áleggja okkara ungdómi at ogna sær í fólkaskúlanum, framhaldsdeildunum og á miðnámsskúlunum. Við alheimsgerðini er kunningartøknin eisini komin til Føroya. Miðlarnir eru broyttir frá bert at vera bløð og skrivaður tekstur annars, til at vera margmiðlar, ið sameina myndir, ljóð og tekst. Og eins týðandi partur av tí modernaða vitanarsamfelagnum sum vitan er, er eisini samskifti umvegis og brúk av ymsum broytiligum miðlum. Og tað er her, at skúlaverkið í Føroyum haltar alvorliga aftanfyri onnur skúlaverk í teimum londum, vit gjarna vilja samanbera okkum við.

**Tann klassiski skúlin**

Føroyski skúlin byggir enn á tann klassiska skúlaformin. T.e. at "verulig" vitan er bóklig vitan, og at "verulig" mentan eru bókmentir og skulptur- og málningalist. Vit áleggja okkara ungdómi at læra hesi ting, tí tey eru tey "røttu" tingini at vita, og alt annað s.s. teldur, internet, fartelefonir osf., er bert tvætl. Men veruleikin er tann, at við bert at læra ungdómin hesi tingini, so læra vit tey at gerast borgarar í einum samfelag, sum var til fyri nógvum árum síðani. Vit læra tey ikki at gerast virknir borgarar í samfelagnum, sum tey koma út í aftaná loknan lesnað. Orsøkin er sera einfald. Generella hugsanin er, at margmiðlar eru nakað tvætl, og teir skulu beinast burtur, so skjótt komið er innum skúladyrnar. *Sløkk fartelefonina, lat farteldduna aftur og fylg við osf.*.

**KT ein fortreyt**

Um vit skulu geva okkara ungu ta neyðugu vitanina til at gerast virkir borgarar í heimssamfelagnum, er neyðugt at vit taka margmiðlarnar við í innlæringina. Tað sum tey ungu í dag læra av KT, læra tey í stóran mun uttanfyri skúlan. Ókritiskt ogna tey sær hesa vitan, sum tey fáa brúk fyri úti í tí veruliga lívinum og í arbeiðinum. Og hetta kann gerast ein katastrofa fyri Føroyar. KT er í dag ein fortreyt fyri, at vit kunnu gerast partur av tí modernaða alheiminum. Og um vit skulu vera eitt veruligt vitanarsamfelag, er neyðugt at vit læra at samskifta gjøgnum teir nýggju og broytiligu miðlarnar. Vit eiga at læra tey ungu at nýta teldur o.a. sum amboð, heldur enn at bert til undirhald. Tað, ið vit læra í dag um miðlar, læra vit í frítíðini, og eftir tørvi. Vit læra ikki um allar teir møguleikar, ið miðlarnir geva okkum í dag. Tey kønu innan økið siga, at besta undirvísingin tekur støði í veruleikanum hjá næminginum. Men hetta er als ikki støðan í dag. Tí eigur KT at gerast ein náttúrligur partur av undirvísingini hjá næmingunum í føroyska skúlanum, soleiðis at okkara næmingar læra at gerast virknir borgarar í heimssamfelagnum.

Øll hesi tingini kann eg sjálvur staðfesta, eftir skjótt 13 ár í føroyska skúlaverkinum.

**Ger nakað við støðuna!**

Skyldin til verandi støðu liggur ikki eina hjá lærarunum ella skúlanum. Tað er skúlaskipanini, tað er galið við. Og tað eru bert politikararnir, ið hava valdið til at broyta skúlaskipanina. Tískil liggur skyldin hjá politisku skipanini, og nógvum av teimum stirvnu politikarum, ið manna Løgtingið í dag.

Gev tí Løgtinginum eina innsprænging av nýhugsan og arbeiðsorku, ið tekur støði í heiminum í dag, og vel ungdóm á ting!

# Tá ið langt er millum orð og gerð



Val X

HELENA DAM Á NEYSTABØ
Javnaðarflokkurin

Javnstøða er eitt orð, sum vit hava hoyrt ofta í hesum valstríði. Javnstøða millum kvinnur og menn, og javnstøða millum førleikaskerd og øll hini. Tað sum eyðkennir hendan orðadrátt er mangan, at tað eru bert orð. Orð, orð og aftur orð.

Í 1999 viðgjørdu vit í Løgtinginum ST-fyrimyndarreglurnar, sum skulu tryggja rættindi teirra brekaðu – til javnsstøðu, til arbeiði, til bústað eins og høggligar atkomumøguleikar á ymsan hátt. Hesar meginreglur skuldu fáa øll at skilja tann veruleika, tað eru avmarkingarnar í umhvørvinum, sum forða fólki við førleikatarni at luttaka á jøvnum føti við onnur, heldur enn at tað er sjálvt brekið, sum er forðingin, og at allur tann politisku myndugleikin hevur skyldu til at beina hesar forðingar burtur.

Enn eru Føroyar ikki sjálvstøðugur limur í ST. Kortini eiga vit at fylgja altjóða leiðreglum STs. Í 2007 samdust tey í ST um ein nýggjan sáttmála um rættindi teirra brekaðu, og eisini hann fara vit helst at seta í gildi í Føroyum.

Men hvussu gongst so við at fylgja teimum sáttmálum, sum vit hava samtykt? Tað gongur framá, einki at ivast í tí. Og eisini í farna valskeiði eru stór framstig gjørd, ikki minst Javnaðarflokkinum fyri at takka.

Men enn er langt á mál.

Enn fáa borgarar og avvarðandi teirra við hoyribreki ikki nóg góða frálæru í teknmáli. Og í dag hoyrdist, at Kringvarpið gevst við teknmálssendingum. Enn eru tað mong við skerdum arbeiðsførleika, ið ikki sleppa at virka á arbeiðsmarknaðinum, og tað eru framvegis alt ov nógvir føroyingar, ið hava tørv á serligum bústaðarmøguleikum, viðgerðartilboðum og uppvenjingartilboðum - sum framvegis bíða.

Í komandi valskeiði skulu vit seta okkum fyri at leggja neyðugar langtíðarætlanir á hesum øki – og at fremja tær í verki. Tað skuldi verið líka so sjálvsagt, sum at leggja eina langtíðarverkætlan fyri útbygging av samferðsluni.

Men so er bara ikki – enn. Tað er framvegis ov langt millum orð og gerð.